# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

†

## Andlát og jarðarferðir

**Gestur Tórsberg Olsen, Tórshavn**, ættaður úr Hósvík, andaðist týsdagin 9. februar á Landssjúkrahúsinum, 69 ára gamal.

Kistan við **Sonju Jungehag í Vági** fer úr kapellinum á Suðuroyar Sjúkrahúsi fríggjakvøldið kl. 18. Jarðarferðin verður úr Bethel leygardagin kl. 13. Tey, ið vilja minnast Sonju, kunnu lata Trúðboðanum eina gávu, konta í Suðuroyar Sparikassa.

**Preben John Olsen, Ballerup**, maður Jonhild Glerfoss úr Mikladali, andaðist leygardagin 6. febr. á Herlev sjúkrahúsi, 71 ára gamal. Jarðarferðin verður týsdagin 16. februar kl. 13 frá Vestkirken, Platanbuen 6, Ballerup. Tey, ið vilja minnast Preben kunnu lata Krabbameinsfelagnum eina gávu.

**Elsebeth Wood, vanliga nevnd Ebba**, ættað úr Tórshavn, búsitandi í Corby í Englandi andaðist leygardagin, 86 ára gomul.

†

Sagt verður frá, at kæra móðir, vermóðir, omma og langomma okkara

**Súsanna Maria Danielsen**
búsitandi í Havn
ættað úr Hvalvík (Uppi í Geil)

andaðist á Landssjúkrahúsinum týsdagin 9. februar, 99 ára gomul.

Jarðarferðin verður leygardagin 13. februar kl. 13.00 úr Havnar kirkju.

*Fyri tey avvarðandi*
**Hans og Magnus**

Fyri 25 árum síðan:

# Jákup í Lopra keypti Hotel Føroyar


tíðindablaðið
sosialurin
Nr. 16 ★ hósdagur 7. februar 1985 58. árg. ★ kr. 5.

Bankaránarar goymdu pengar í kustaskafti

Nýggi eigarin á Hotel Borg

Spennandi avbjóðing at royna nýggja leið

Eyka ferðslulóg verður sett í gildi

Hósdagin 7. februar 1985 skrivar Sosialurin, at í vikuni keypti Jákup Joensen í Lopra Hotel Føroyar við Oyggjarvegin fyri 50 milliónir krónur.

Sosialurin fekk eitt prát við Jákup, áðrenn hann fór niðan á hotellið, sum hendan dagin skifti navn frá Hotel Føroyar til Hotel Borg.

Jákup sigur m.a. í samrøðuni: Tá eg fyri 14 døgum síðan fór til USA á eini arbeiðsferð, visti eg at hotellið skuldi seljast, og í hesum sambandi bað eg um upplýsingar og tilfar um hotellið, sum eg kannaði á ferðini. Tá eg kom heim aftur fríggjadagin, fekk eg at vita, at seinasta freist at lata tilboð inn var klokkan fýra seinnapartin. Við tyrluni kom eg til Havnar hálvan tíma áðrenn, so tað var ikki nógv tíð at umráða seg í.

Tá blaðkvinnan á Sosialinum spyr Jákup, sum eigur bæði trolarar og flakavirki, um hann heldur at ferðafólkavinnan verður ein týðandi táttur í samfelagsbúskapinum í framtíðini, sigur hann at tað heldur hann avgjørt. Hóast veðurlagið her hjá okkum ikki er sum í øðrum londum, har ferðafólkavinnan hevur virði í samfelagsbúskapinum, heldur hann at vit hava eitt sera vakurt umhvørvi at bjóða, og tað vænti eg mær nógv av í framtíðini.

*- red*

### Prógv



Daniel Sundstein hevur tann 29. januar fingið prógv sum professionsbachelor í fysioterapi á Professionshøjskolen Metropol í Keypmannahavn.

## Merkisdagar

**50 ára føðingardagur**
18. feb. verður Símun Poulsen, Bøgøta 15, Klaksvík, 50 ár. Dagurin verður hildin leygardagin 20. feb í Skálanum frá kl. 17, har øll eru hjartaliga vælkomin. Tey í vilja gleða Símun við at koma í føðingardag, kunnu siga frá á tlf. 221265 ella 220109 innan 14. feb.

**70 ára føðingardagur**
Mánadagin 15. feb. verður Maria Jacobsen á Langanesi, á Glyvrum, 70 ár. Dagurin verður hildin á Sjókafeini leygardagin 13. feb. kl. 18.30.

**75 ára føðingardagur**
Fríggjadagin 12. feb. verður Arni Johannesen, Tórshavn, 75 ár. Dagurin verður hildin leygardagin 13. feb. millum kl. 11-16 hjá soninum í Faksagøta 5 á Norðasta Horni.

**80 ára føðingardagur**
28. feb. verður Hildigarð Nattestad, Hvalba, 80 ár. Dagurin verður hildin 20. feb. í gistingarhúsinum í Øravík, kl. 18, har øll eru hjartaliga vælkomin.

**90 ára føðingardagur**
Leygardagin 13. feb. fyllir Eivind Gudmundsen, Sandavágur, 90 ár. Dagurin verður hildin í SÍF-húsinum frá kl. 16 til 21. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Gullbrúdleyp**
Hósdagin 4. feb. hava Oda og Árni Frederiksberg, á Strondum, gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin figgjakvøldið 19. feb. frá kl. 18 í Kelduni í Skálafirði.

**Diamantbrúdleyp**
Fríggjadagin 12. feb. hava Hanna og Eirik Justinussen, Leirvík, diamantbrúdleyp. Dagurin verður hildin hjá dóttrini á Dalavegi 40, Tórshavn, millum kl. 14 og 18.

**Prógv**
Jytta Friang Magnusardóttir, Fuglafjørð, hevur tann 29. jan. lokið prógv sum cand. Med. Á Odense Universitet.

## Dagurin

**11. februar. Kongadagur**. Ta náttina í 1659 søktu svensk herlið at Keypmannahavn, men atsóknin miseydnaðist. Navnið kongadagur sipar til báðar kongarnar, sum stóðu á odda í stríðnum, tann danska Fríðrik III og tann svenska Karl X Gustav. Sagt varð, at versta tíðin til veður var millum konganna, tað er frá trettanda (teir tríggir heilagu kongarnir) og til kongadagin.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*